# Skipari rópar varskó: Støðan við

**- Tað verður serliga flakavinnan, sum kemur at kenna sviðan av, at tann stóri upsin er burtur av grunnunum. Tí haldi eg, at tað ongantíð er ov skjótt at fáa prógv fyri, hvat er vorðið av tí stóra upsanum, sigur royndur upsaskipari, sum heldur, at myndugleikarnir beinanvegin eiga at seta eygleiðarar umborð á teir stóru svartkjaftatrolararnar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast nógv er til av smáum upsa – ja, so nógv, sum kanska ongantíð áður, er tað ein sannroynd, at tann stóri upsin at kalla er burtur av Føroyaleiðini.

- Eg meti, at støðan er so álvarslig, at verandi gongd, har upsin alsamt gerst smærri og smærri, kemur at ganga útyvir okkara flakavinnu.

Hetta sigur ein royndur skipari, sum í mong ár hevur fiskað upsa undir Føroyum.

### Minkar framvegis

Hann vísir á, at upsin seinastu árini bara er vorðin smærri og smærri, og einki bendir á, at gongdin er við at venda.

- Eg haldi, at upsin minkar framvegis. Í bløðunum hevur onkur sagt, at tað eru orsøkir í náttúruni, sum eru atvoldin til gongdina, men her eri eg slett ikki samdur.

Skiparin heldur, at tað einasta rætta, er, at myndugleikarnir seta eygleiðarar umborð á teir stóru svartkjaftatrolararnar fyri at staðfesta – ella avsanna – um tann stóri upsin ávísar tíðir av árinum endar í stóru trolunum hjá hesum skipum.

Hann heldur, at neyðugt er í minsta lagi við tveimum ella trimum eygleiðarum umborð á einum tílíkum skipi, um haldgóð prógv skulu fáast fyri, hvussu veruliga støðan er.

- Eru tríggir eygleiðarar umborð, kunnu teir ganga vakt 8 tímar í part hvørt samdøgur, og tá fáa vit eina haldgóða mynd av støðuni. Tá ið nøgdirnar eru so stórar, gongur alt skjótt fyri seg, og tí kann vera torført at síggja, hvussu skilið er, um eftirlit ikki er alt samdøgnið. Tað verður eingin, sum missir nakað, um hesi viðurskifti verða kannaði, men her kann vera nógv hjá okkum at vinna.

Hann heldur, at hugskotið um at krevja rist í hesi stóru svartkjaftatrolini, er




# Ein nýggjur Varði – úr stáli

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fiskiskipaflotin í Norðoyggjum gjørdist ein nýbygning ríkari, tá ið nýggi og snotuligi Varðin legði til bryggju í góðveðrinum í Hvannasundi seinasta fríggjadag.

Vit prenta nakrar myndir frá løtuni, tá ið Varðin stevndi inn á Hvannasund og frá móttøkuni, ið skipað varð fyri.

Seinni fara vit at skifta orð við eigararnar av hesum nýggja Varða, sum vónandi verður eigarum og manning til stóra gleði.

Vit takka Norðlýsinum fyri lán av myndum.




